# Revapelsar og kópaskinn



Rannva framsýnir hennara 2008 kollektion í Smiðjuni í Litluvík 1. – 3. Novembur.

Opið er
leygardagin kl. 10-20
sunnudagin kl. 14-20
manadagin kl. 10-20

Frakkar • Anorakkar • Taskur • Vøttir

Søluframsyning



## Klaksvíkar Sjúkrahús

Tlf: 45 45 45 lokal 123
Fax: 45 73 63 · 700 Klaksvík

# Sjúkrarøktarfrøðingar

**Anæstesideildin**
Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing frá 01.01.09 – 31.08.09 ella eftir nærri avtalu. Neyðugt er við serútbúgving sum anæstesi-sjúkrarøktarfrøðingur

**Deild A – Kirurgisk songjardeild**
Á deild A eru hesi størv leys at søkja:

2 størv sum sjúkrarøktarfrøðingar at arbeiða 1,0 tíð í skiftandi vaktum frá 01.12.08 ella eftir nærri avtalu.

1 starv sum avloysari fyri sjúkrarøktarfrøðing at arbeiða 0,5 tíð í skiftandi vaktum frá 01.01.09 – 31.12.09 ella eftir nærri avtalu.

**Deild M – Medicinsk songjardeild**
Á deild M eru hesi størv leys at søkja:

1 starv sum sjúkrarøktarfrøðingur at arbeiða 0,7 tíð í skiftandi vaktum frá 01.01.09 ella eftir nærri avtalu.

1 starv sum sjúkrarøktarfrøðingur at arbeiða 0,8 tíð í skiftandi vaktum frá 01.01.09 ella eftir nærri avtalu.

Nærri fæst at vita um størvini á okkara heimasíðu www.ks.fo

Lønar- og setunnartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Umsókn saman við prógvi og autorisatión, verður at senda til Klaksvíkar Sjúkrahús, att: umsjónarmaðurin, FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist 14. novembur 2008



HEIM • STYLING

INTERIOR • TLF 258543



Sosialurin -har tað hendir





## Tofta skúli

Heygsveg 28 · FO 650 Toftum
Tlf. 447332 · fax 449532 · t-postur: tof@skulin.fo

### Endurlýsing

Vegna ov fáar umsóknir verður starvið endurlýst:

# Tofta skúli søkir eftir avloysara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

Tíðarskeiðið verður frá 6. november til 6. juni 2008

**Skúlanum tørvar lærara, ið kann átaka sær:**
- føroyskt, rokning, sang, kristni í 1. flokki og 9. flokki
- tónleikabreyt 10. flokki
- stuðul í flokkum og hjá næmingum

**Vit vænta at tú:**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert fús/ur at taka á teg tær uppgávur sum eru í skúlanum
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastarvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 6. november kl. 12.00

Nærri fæst at vita um starvið frá Maritu Dalsgaard, skúlastjóra á tlf. 447332 & 747765.

**Tofta skúli** hevur 198 næmingar í 1. – 10.fl. og 27 starvsfólk. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/tof



TVØROYRAR KOMMUNA

## Lýsing um valevnislistar og brævatkvøður til skúlastýrisvalið á Tvøroyri 11. novembur 2008

Valevnislistar skulu vera valnevndarformanninum í hendi í seinasta lagi **4. novembur 2008 kl. 18.00.**

**Brævatkvøður.** Teir veljarar, sum ikki kunnu møta á valdegnum, kunnu, við at venda sær til formannin í valnevndini á telefon 371582, atkvøða við brævatkvøðu í seinasta lagi
**10. novembur 2008 kl. 18.00**

**Valnevndin fyri skúlastýrisvalið á Tvøroyri**





# Klaverundirvísing

Ert tú komin eitt sindur upp í árini og ergrar teg yvir, at tú ikki lærdi at spæla klaver sum barn, so hevur tú møguleikan nú. Hendan undirvísingin fevnir um at spæla sangir og akkordir eftir nótum og becifringum, altso ein blanding av nótaspæli, akkordspæli og gehørspæli. Hetta verður ofta nevnt brúksklaver.

Undirritaði er útbúgvin sum klaverleikari- /lærari og hevur síðan 1972 undirvíst í tónleiki á Føroya Læraraskúla. Nógvir av tímunum har vóru júst undirvísing í brúksklaveri.

Hevur hetta tín áhuga, so ring á tlf. 314183

**ÁRNI HANSEN**



TVØROYRAR KOMMUNA

## Søkt verður eftir dagrøktara til dagrøktaraskipanina í Tvøroyrar kommunu

Søkt verður eftir dagrøktara til dagrøktarskipanina í Tvøroyrar kommunu, fyri dagrøktara í barnsburafarloyvi, at byrja 1 desember 2008

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur góðar umstøður, at hava børn, bæði inni og úttanfyri.
- At tú tekur ábyrgd og kann arbeiða sjálvstøðugt.
- At tú vísir umsorgan fyri børnunum, foreldrum og starvsfeløgum..
- At tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir.
- At tú ert tolin og vísir umsorgan.
- At tú hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- At tú dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar.
- At tú hevur roykfrítt og viðkvæmisvinarligt heim.

Vit kunnu bjóða tær starv í eitt avmarkað tíðarskeið, við góðum álítandi samstarvsfeløgum.

Í dagrøktini á Tvøroyri starvast 1 leiðari
Ein økispedagogur og 16 dagrøktarar

**Nærri fast at vita um starvið við at venda sær til:**
Súsannu Poulsen dagrøktarleiðara
Tlf. 28 13 39

**Umsóknarfreist:**
14 novembur 2008, kl. 16.00

Vinarliga send umsókn tygara til:

**Dagrøktarskipanin**
Tvøroyrar kommuna
Miðbrekka 14
800 Tvøroyri